LM-099/2023

Fylgiskjal 50

SUNDA KOMMUNA

Tlf. +298 66 72 71
sunda@sunda.fo
www.sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postsmoga 10
FO 400 Oyrarbakki

Uttanríkis-og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7 - Postrrúm
110 Tórshavn postsmogur

Dato:23. februar 2024

J.nr.:: 2024-0250-033-3
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: Jógvan Kruse

Tygara skriv: 23/25395

Hoyringarsvar til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu

Fyrst fegnast vit í Sunda kommunu um, at vit nú loksins hava fingið eitt ferðavinnulógaruppskot at fyrihalda okkum til. Tó, eins og millum føroyingar flest, eru sjónarmiðini ymisk í býráðnum.

Tá tað kemur til innanlands ferðavinnu, síggja vit tað sum eina landsuppgávu at skipa karmar, trygd, vernd, undirstøðukervi, almenna samferðslu v.m. sum fylgir við einari skjótt vaksandi ferðavinnu.

Tó so hava vit sum kommuna lutvíst átikið okkum fleiri av hesum leiklutum, sum verða figgjað av lokalu skattgjaldarunum, fyri at herberga ferðavinnuni sum floymir yvir og í gjøgnum serliga okkara smærru bygdarsamfeløg.

Við hesum lógaruppskoti verður parturin uttangarðs útveittur til okkum kommunur við lóg at taka okkum av, og eitt ókent figgjarligt endurgjald verður latið.

Tá tað kemur til ferðavinnu í Sunda kommunu, taka vit altíð høvuðsatlit til okkum sum búgva og virka her í kommununi, og kemur ferðavinna í øðrum ella triðja lagi. Tó so viðurkenna vit, at ferðavinnan er her, og er komin fyri at vera, og hóast ferðavinnan fyri summi hevur stóran ampa við sær, gevur ferðavinnan eisini møguleikar við sær.

Sambært Heimabeiti eru tað 481 hagar í Føroyum í 29 kommunum.
Ofta verður víst til 80/20 regluna, men eg vænti, at vit eru nærri 90/10 regluni.
Tvs. at 90% av ferðavinnugongdini í haga er í 10% av høgunum. Tí eigur Landsstýrismaðurin at umrøða, um sjónarmiðini hjá Sunda kommunu, bygdum, eigarum og brúkarum í Sunda kommunu har verulig ferðavinnugongd er í haga, eiga hava eina munandi hægri vekt enn har lítil ferðavinnugongd er í haga.

Til lógaruppskotið sjálvt fara vit at byrja við lógarheitinum:
"Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)" í eintali og bundið.
Innihaldið í lógaruppskotinum umfatar tó einans tað, sum vit í gerandistalu hava lýst sum ***"gongd í haga"***, og er ferðavinna í Sunda kommunu munandi nógv meira og annað enn tað, sum "Ferðavinnulógin" avmarkar seg til. So antin má heitið á lógini avspegla innihaldið í lógini, ella má innihaldið í lógini liva upp til heitið á lógini.

Tlf. +298 66 72 71
sunda@sunda.fo
www.sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postsmoga 10
FO 400 Oyrarbakki

Endamál

§ 1. Ferðavinna skal í øllum lutum skipast á burðardyggum grundarlagi til tess at tryggja fólkaræði, frælsi, trivnað, inntøkur og vinnumøguleikar hjá fólkinum kring landið við at
1) verja náttúru, tilfeingi og siðvenju,
2) styrkja staðbundin samfeløg, mentan og mentanararv,
3) styrkja samstarv millum ferðavinnu og aðrar vinnur, og við at
4) kunna um, hvussu farast skal fram í náttúruni, og hvussu ferðavinnan er skipað.
Stk. 2. Reglur, fyriskipanir, avtalur o.a., framt eftir hesi løgtingslóg, skulu miða eftir at røkka hesum málum.

Vit taka fult undir við endamálinum, og at rætturin hjá føroyingum til ókeypis at ferðast í náttúruni – av fjalli í fjøru – skal tryggjast.
Eftir er stóra kjakið og ymsu tulkingar, um lógaruppskotið livir upp til endamálið í breiðum týdningi í øllum lutum.

Sunda kommuna viðmerkir við atliti sum beinleiðis viðkoma okkum sum kommuna í §4.stk.4. - §6. - §7. - §8. - §9. - §11. og §14.

Fyrst av øllum, fara vit yvirskipað at mæla til, at Landsstýrismaðurin tekur allar ivaspurningar til sín, sum kunnandi fundirnir um landið hava sett fram, umframt tað um øll hoyringarsvar koma við, og fáa greitt lýst hesi í lóggávuni við tilhoyrandi viðmerkingum. Hetta tí, at vit sum kommuna við lógaruppskotinum fáa ein týðandi leiklut at umsita fleiri ásetingar í lógini, og henda umsiting av lógini eigur ikki at vera latin upp fyri óneyðugum ósvaraðum spurningum til tulkingar.

Hartil eigur endurgjaldið fult og heilt at samsvara við uppgávurnar, lógaruppskotið áleggur okkum í Sunda kommunu.

Til lógartekstin eru hesar viðmerkingar:

- §4.stk.4. Í sambandi við kommunalu tilbúgvingina, mæla vit til, at loyvið verður at hava hund við sær uttangarðs í sambandi við venjing, leiting og bjarging.

- §6. Her verður álagt Sunda kommunu at gera eina ferðavinnuætlan í samráð við serstøku nevndirnar í §7 og í samráð við eigara ella brúkara. Í Sunda kommunu eru 36 hagar, bæði ognarhagar og festi, so í roynd og veru er talan um minst 36 ymiskar undir ferðavinnuætlanir. Í sambandi við hvussu ognarar og festibøndur skilja og tulka verandi lóggávuuppskot, kann hetta metast sum ein størri, tíðar- og orkukrevjandi uppgáva umsitingarliga, sum umframt at útinna ætlanina eisini skal viðlíkahalda ferðavinnuætlanina við atliti til allar partar.
  Í sambandi við vantandi semju millum partarnar, skal greið mannagongd fyriliggja um, hvussu farast skal fram.
  Harafturat liggja okkara bygdagøtur gjøgnum fleiri hagar og fleiri bygdagøtur yvir um kommunumark, og mugu ferðavinnuætlanirnar tí, umframt omanfyri, samsvara tvørtur um kommunumark.

Tlf. +298 66 72 71
sunda@sunda.fo
www.sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postsmoga 10
FO 400 Oyrarbakki

- §7. Uppskotið til lógartekstin saman við viðmerkingunum leggur upp til, at vit í Sunda kommunu skulu seta upp til 11 serstakar kommunalar nevndir til okkara 11 bygdir. Eins og í §6 økir hetta munandi um umsitingarliga partin í kommununi við upp til 11 nýggjum nevndum.

- §8. Her verður álagt Sunda kommunu í samráð við eigara ella brúkara, viðkomandi myndugleikar og stovnar, at merkja upp farleiðir, gera nýggjar farleiðir til tess at skipa ferðsluna uttangarðs, umframt at halda tær gomlu bygdargøturnar.
  At áleggja Sunda kommunu við lóg nýgerð av farleiðum uttangarðs í sambandi við burðardygga ferðavinnu, umframt at halda verandi bygdagøtur verður mett, at hesar uppgávur eru stórar og kostnaðartungar uppgávur, samstundis sum verandi umsjónin á sløttum, nú eisini skal røkka úr fjøru upp á fjallatind. Hesa uppgávu er Sunda kommuna ikki sinnað at áleggja skattaborgarum í Sunda kommunu. Tí skal Landsstýrismaðurin tryggja, at neyðuga fíggingin samsvarar stóru uppgávunum lógin áleggur Sunda kommunu.

- §9. Her verður latið Sunda kommunu møguleika í samráð við eigara ella brúkara at áseta skilhaldsreglur, sum øll, sum ferðast í økinum, skulu fylgja. Landsstýrismaðurin skal góðkenna skilhaldsreglurnar og lýsa hesar í kunngerð.
  Eftirlitsmyndugleikin framgongur ikki í §9. og metir Sunda kommuna seg ongan leiklut hava sum eftirlitsmyndugleiki.
  Hartil kann roknast við, at eitt ávíst trýst frá eigara ella brúkara kann vera lagt á kommununa um at skipa skipa skilhaldsreglur í okkara 36 høgum, sum aftur kann hugsast at tyngja umsitingina í Sunda kommunu.

- §14. Inntøkugrundarlagið verður ásett við náttúrugjaldinum í §13 og er samansett við gjaldi fyri hvørt ferðafólk. Her eigur hugtakið "ferðafólk" greitt at vera lýst í §2, tá ferðafólkatalið saman við støddini á náttúrugjaldinum gevur grundarlagið undir kommunala endurgjaldið.
  Sjálvt býtið millum partarnar fær Sunda kommuna ikki fyrihildið seg til. Tí hóast at tað greitt framgongur, at ein helvt er til kommunurnar, so framgongur býtið millum okkum 29 kommunur ikki greitt. Kommunurnar er sera ymiskar í stødd, úr 9 km^2 upp í 173 km^2. Sunda kommuna er næst største kommunan í Føroyum við 158 km^2, har tað mesta er uttangarðs, meðan íbúgvatalið fyri hvønn km^2 er undir 9% av tí í t.d. Tórshavnar kommunu. Tvs, at uppgávan fyri hvønn íbúgva í Sunda kommunu er 11 ferðir so stór sum fyri hvønn íbúgva í Tórshavnar kommunu.
  Harafturat eru náttúruperlurnar í Sunda kommunu millum størstu ferðavinnumál í Føroyum. Tað er altavgerandi, at økt fíggjarbyrða ikki verður løgd á skattgjaldaran í Sunda kommunu við lógini um burðardygga ferðavinnu, sum umframt at leggja rygg til stóran partin av innanlands ferðavinnu nú eisini skuldi rinda fyri at leggja rygg til.
  Tí skal Landsstýrismaðurin tryggja, at fíggjarliga endurgjaldið til Sunda kommunu og bygdirnar í kommununi, fult og heilt samsvarar við uppgávurnar álagdar í §6. - §7. - §8. - §9. og §11.

LM-099/2023

Tlf. +298 66 72 71
sunda@sunda.fo
www.sunda.fo

Oyrarbakkavegur 3
Postsmoga 10
FO 400 Oyrarbakki

Samaumtikið:

Við lógaruppskotinum um burðardygga ferðavinnu, meta vit at kommunalu uppgávurnar við §6. - §7. - §8. - §9. §11. eru umfatandi og kostnaðartungar. Tað er altavgerandi, at fult endurgjald verður latið fyri tær uppgávur sum verða okkum álagdar.
Samsvar skal eisini verða millum álagdar uppgávur og tíðarásetingina fyri, nær væntast kann, at hesar eru loystar.
Fyri at lógin skal liva upp til §1 í øllum lutum, skulu nógv ivamál lýsast, greinast og tillagast fyri at Sunda kommuna kann umsita eina lóg um burðardygga ferðavinnu í Føroyum.

Vinarliga
Sunda kommuna

Jógvan Kruse
Borgarstjóri